# Áskoðarar sum perversir lúrarar

**Spælið hjá Gunnvá Zachariassen í leikinum 4.48 Psykosa er so sannførandi, at tað kennist næstan perverst at sita og gløða at djúpt persónliga sorgarleikinum**

UMMÆLI

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Longu frá byrjan er leikurin 4.48 Psykosa hjá leikbólkinum Tvazz ein í allar mátar øðrvísi sjónleikauppliving. Í gongini situr ein 'yvirlækni' í hvítum kitli og grønari húgvu og spælir klaver, meðan ein 'sjúkrasystir' vísir áskoðarunum yvir til garderobuna, har øll fáa boð at lata seg í ein av hvítu kitlunum, sum hanga og bíða.

- Nú eru tit læknar, sum ein av 'læknunum' sigur, meðan hann vísir áskoðarunum inn í eitt rúm, har vit sessast við tvær langar røðir av borðum, hvørju megin tóma gólvið í miðjuni.

Í tí hurðin klamsar aftur aftan fyri meg, hómi eg eitt sjálvmorðsbræv hanga á vegginum úti í gongini. Um tað er brævið, hvíti kittulin ella gráhvíta rúmið úti á Landssjúkrahúsinum, sum ger tað, er ilt at siga, men við eitt er hugnaliga kenslan av at vera til sjónleik horvin.

## Gløðir inn í búrið

Aftur og fram eftir gólvinum klórar, gresjar, mutlar og skríggjar desperata ferðin hjá tunglyntu ungu kvinnuni seg fram móti sjávmorðinum beint framman fyri eygunum á tær. Ein lagna, sum Gunnvá Zachariassen gevur ella rættari tekur lívið av á ein hátt, sum eg illa dugi at ímynda mær, kann gerast meir sannførandi. Sjálvt, tá hennara sjúka sinni hevur fløkt seg so langt út, at orðini ikki geva meining longur, ivast tú ikki í, at hennara pína er andskræmilig. Tú sært tað á løgnu sitrandi rørslunum, forfylgdu og bønandi eygunum, sum næstu løtu bora seg óndskapsfult inn í alt, sum fyri er. Tú hoyrir tað á tivandi røddini, snorutu nýsunum, og tú følir tað, tá hon kemur so fitt yvir og gevur tær ein lítan lepa. Á mínum stendur: "At sleppa undan skomm" skrivað pent og samvitskufult við tjúkkum blýanti.

Nakna spælið hjá Gunnvá Zachariassen fær teg at kenna teg sum ein perversan lúrara, sum situr og gløðir at eini djúpt persónligari neyð. Alt meðan tú næstu løtu ert hjálparleysi áskoðarin, sum ikki fær gjørt annað enn tigandi hugt at, meðan hetta menniskja liggur í sínum búri og ringir seg saman í síni einsmøllu pínu.

## Egið lív

Men 4.48 Psykosa tránýtir ikki bara leiklutin hjá áskoðaranum sum handlingslammaður eygleiðari til tað ítarsta. Eisini í aðrar mátar vísir leikurin, hvat tað er, sum sjónleikur kann. Myrkrið sum sýgur seg saman um gapandi tóma gólvið saman við melankolska tónleikinum letur frá byrjan lúkuna til sálarliga dýpið upp uttan eitt orð. Og tá orðini í frálíku týðingini hjá Gunnari Hoydal koma, fáa eisini tey sítt egna lív. Fyrst skilagóð, bønandi, síðani poetisk ella fremmandakent teskandi úr einum hátalara, til tey enda sum grælandi óljóð, ella rútmiskt messandi og doyvandi, eins og vóru tey sissandi heilivágur.

## Rútma skeiklast

Leikurin 4.48 Psykosa hevur uttan iva volt leikstjórum mikið høvuðbríggj, síðani leikritið fyrstu ferð sá dagsins ljós í 1999, eftir at leikhøvundurin Sara Kane hevði gjørt sjálvmorð. Í onkrari uppseting er leikurin mest at líkna við ein monolog, meðan aðrar uppsetingar hava valt at lata eina røð av leikararum bera fram ymsu røddirnar, ið spøkja í høvdinum á ungu kvinnuni.

Í føroysku uppsetingini hevur leikstjórin valt taka brot við dialogi millum ungu kvinnuna og hennara lækna við. Eftir mínum tykki er hetta eisini minni væleydnaði parturin av leikinum. Ikki tí, brotini eru væl spæld, men onkursvegna bróta tey serstøku rútmuna millum djúpt persónligu pínuna hjá ungu kvinnuni og hennara leitan eftir einum svari, sum tykist hoyra einum øðrum heimi til. Eisini mana hesi brotini fram klisjéina um unga kvinnuliga sjúklingin sum verður forelskað í læknanum hjá sær. Uttan iva ein sonn klisjé, men ein klisjé, sum hevur lyndi til at gera leikin til ein vanligan sjónleik - og tað er 4.48 Psykosa á ongan hátt



*Eins og eitt meiðslað djór í einum búri, ringir unga kvinnan seg saman á gólvinum í frálíkum spæli av Gunnvá Zachariassen*

*Mynd: Bárður Eklund*





*Sum ein rond av kannandi læknum sessaðust áskoðararnir við lang borð í kalliga rúminum*